***Johan Dahl***
***landsstýrismaður***

***Svar***

***uppá***

***fyrispurning frá Eivin Jacobsen, løgtingsmanni, í løgtingsmáli nr. 95/2014, viðvíkjandi Føroya Tele.***

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. *Kann landsstýrismaðurin í vinnumálum kunna Løgtingið, um Føroya Tele hevur nakrar ætlanir um at betra um dekningin og hoyrilíkindini, tá koyrt verður á landsvegunum?*
2. *Hevur Føroya Tele nakað yvirlit yvir, hvussu dekningurin og hoyrilíkindi eru runt um í landinum?*
3. *Føroya Tele hevði eitt stórt avlop í 2013, har landskassin fekk 30 mió.kr. í vinningsbýti, og árið 2014 var nærum líka gott. Átti hetta ikki, at komið brúkarunum til góðar við betri hoyrilíkindum?*

***Viðmerkingar***

*At hava eitt gott støðugt telenet og samskifti eigur at vera ein sjálvfylgja í einum framkomnum samfelagi, nú vit skrivað 2015, bæði privat og vinnuliga.*

*Vit mugu ásanna, at okkara gerandisdagur seinastu árini er nógv broyttur og byrjar vanliga við, at tú hevur brúk fyri at samskifta antin innan arbeiði ella privat.*

*Hetta er ein tørvur, sum er uttan mun til, um tú koyrir í einum bussi, hýruvogni ella privatakfari. Menningin tøkniliga í dag í flest øllum akførum ger tað møguligt at samskifta uttan at bróta ferðslulógina, tí er hetta vorðið ein partur av arbeiðsdegnum.*

*Kemur tú til landið ella til flogvøllin í dag og hevur brúk fyri at samskifta á veg til miðstaðarøkið, ja so kanst tú vera vísur í, at tað kann bróta av upp til 3 ferðir á túrinum. Um støðan er eins vánalig á øðrum vegastrekkjum í landinum, kundi verið áhugavert at fingið upplýst.*

*Føroya Tele hevur sum endamál at veita eina góða og bíliga samskiftistænastu. Í 2014 fekk landskassin 30 mió.kr. í vinningsbýti, tí átti tað at verið sjálvsagt, at partur av hesum ístaðin kom brúkarunum til góðar við betri hoyrilíkindum.*

***Á Løgtingi, 8. mai 2015***

*Eivin H. Jacobsen*

**Svar:**

1. *Kann landsstýrismaðurin í vinnumálum kunna Løgtingið, um Føroya Tele hevur nakrar ætlanir um at betra um dekningin og hoyrilíkindini, tá koyrt verður á landsvegunum?*

   Ásannast má, at nøkur støð eru á landsvegunum, har dekningurin enn ikki er nøktandi. Føroya Tele arbeiðir í løtuni við eini umfatandi útbygging av fartelefonnetinum, sum kemur at tryggja góðsku og dekning á hædd við tey bestu í heiminum. Væntast kann tí, at trupulleikin við vantandi dekningi summstaðni, verður loystur komandi árið.

2. *Hevur Føroya Tele nakað yvirlit yvir, hvussu dekningurin og hoyrilíkindi eru runt um í landinum?*

   Ja, Føroya Tele hevur dekningskort yvir allar Føroyar. Arbeitt verður við at gera kortið lættari at skilja fyri brúkaran. Ætlanin er at leggja dekningskortið út á heimasíðuna í næstum.

3. *Føroya Tele hevði eitt stórt avlop í 2013, har landskassin fekk 30 mió.kr. í vinningsbýti, og árið 2014 var nærum líka gott. Átti hetta ikki, at komið brúkarunum til góðar við betri hoyrilíkindum?*

   Føroya Tele hevur við lóg skyldu at tryggja eitt gott og nútíðarhóskandi fjarskiftisnet kring alt landið, umframt við umheimin umvegis m.a. sjókaðal.
   Eitt av aðalmálunum hjá Føroya Tele er at skapa eitt fartelefonnet við eini góðsku og dekningi, sum kann metast millum tey bestu í heiminum. Netið verður í nærmastu framtíð útbygt til 4G-fjarskiftisnet, sum verður ein munandi bati, í mun til verandi tænastu og kemur internetferðin somuleiðs at hækka, soleiðis at brúkarin eisini innan breiðband fer at fáa eina betri tænastu enn í dag.
   Góðu úrslitini hjá Føroya Tele koma føroyska brúkaranum til góðar á tann hátt, at Føroya Tele hevur møguleika og kapital til áhaldandi at útbyggja og nútímansgera netið, eisini við góðum hoyrilíkindum, ið sum nevnt væntandi verða upp aftur betri í næstum. Góðu úrslitini hava við sær, at Føroya Tele sjálvt kann fíggja stóran part av íløgunum og hevur hetta harafturat m.a. við sær ein lægri rentukostnað.

   Góðu fortreytirnar hjá Føroya Tele eiga at hava við sær, at føroyski brúkarin kann fáa eina so høga góðsku á fjarskiftisnetinum sum møguligt, so bíliga sum til ber. Hetta eigur til eina og hvørja tíð at vera málið.

Vinnumálaráðið, tann 19. mai 2015

Johan Dahl
landsstýrismaður